# HAVNIN sambært SIC

**Biltúrurin hjá Landsverkfrøðinginum frá 1977 fær nú ljóð. SIC hevur fingið til uppgávu at ljóðseta gamla biltúrin við tungmálmi**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tungmálmsbólkurin SIC hevur fingið til uppgávu at ljóðseta eina filmsupptøku, sum Landsverfrøðingurin í 1977 gjørdi um Havnina. Talan er um ein biltúr gjøgnum Havnina. Filmurin er svartur og hvítur, og hevur einki ljóð. Enn. Verkið, sum SIC á tíðindafundi mikudagin fer at geva ein forsmakk uppá, verður Mentanarnáttina frumframført undir heitinum 100 ár – 1000 sár. Eftir ætlan skal biltúrurin hjá Landsverkfrøðinginum kunna upplivast í Tjóðpalli Føroya Mentanarnáttina.



